# Eitt ár aftrat í HB

*Samstundis sum feløgini í Onglandi í farnu viku skiftu spælarar sum onnur skifta hosur, nú flytingarvindeygað í Premier League lakkaði móti endanum, varð greitt, at HB hevur gjørt avtalu við tríggjar ógvuliga týðandi brikkar í FM-putlispælinum*



**Kaj venur málmenn**
Málmansvenjarin, Kaj Niclasen, hevur gjørt av at taka eitt ár afturat. Kaj kann, saman við FM-heitinum 2010, reypa av, at hann er einasti Vodafone-venjarin í høvðusstaðarøkinum ið ikki fekk fótin í seinasta kappingarári.



**Jan er liðleiðari**
Jan Falkenberg er ímyndin av stríði og strevi handan leiktjøldini í HB. Hóast leikararnir eru lidnir við sítt yrki, er dagurin hjá liðleiðaranum ikki meira enn byrjaður. Umframt hetta álitisstarvið, arbeiðir Jan hjá Húsavarðartænastuni.



**Ólavur er hjálpari**
Ólavur Midjord er hjálpari hjá liðleiðaranum, men sum hann sjálvur sigur, so inniber hetta, at hann ger alt arbeiðið. Hann hevur verið fastur fúsur saman við Jan, nú í fleiri ár.
*(Kelda: hb.fo)*

# Svøvnloysi




Skjótt verður tað til pengar, og so er sloppið

## Í MORGIN

**3/6 °C**




Fleyr til gul av ymsum ættum og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.

## FRÍGGJADAGIN

**5/8 °C**




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

## LEYGARDAGIN

**4/7 °C**




Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið, mánadagin møguliga sum kavi. Hitin millum 1 og 5 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt stormlágtrýst, 944 hPa. eystan fyri Hvarvið fer spakuliga norðureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani til Føroya fer í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og grynnist. Brúgvalagið í landnyrðing úr Føroyum stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 95 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -5 | Tromsø | -- | Moskva | 0 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 2 | Bergen | 0 | Berlin | 5 | Beijing | 0 |
| Tórshavn | 4 | Oslo | -9 | Paris | 13 | New Dehli | 19 |
| Lerwick | 3 | Stokkhólm | -4 | Madrid | 8 | Bangkok | 31 |
| Aberdeen | 4 | Keypmannah. | 0 | Róm | 13 | Sydney | -- |
| London | 13 | Helsinki | -6 | Malorca | 16 | New York | 0 |

## VESTFALLSKYRRINDI

3. febr. Tendring
6. febr. Mánin longst frá jørðini
11. febr. Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. feb. | 10:40 | 23:02 | 09:40 | 22:02 | 09:55 | 22:17 | 00:22 | 12:40 | 01:22 | 13:40 | 08:55 | 21:17 | 07:55 | 20:17 | 10:55 | 23:17 | 11:55 | - | 10:25 | 22:47 | 11:40 | - |
| 10. feb. | 11:22 | 23:44 | 10:22 | 22:44 | 10:37 | 22:59 | 01:02 | 13:22 | 02:02 | 14:22 | 09:37 | 21:59 | 08:37 | 20:59 | 11:37 | 23:59 | 00:17 | 12:37 | 11:07 | 23:29 | 00:02 | 12:22 |
| 11. feb. | - | 12:20 | 11:20 | 23:56 | 11:35 | - | 01:44 | 14:20 | 02:44 | 15:20 | 10:35 | 23:11 | 09:35 | 22:11 | - | 12:35 | 00:59 | 13:35 | - | 12:05 | 00:44 | 13:20 |
| 12. feb. | 00:56 | 13:33 | - | 12:33 | 00:11 | 12:48 | 02:56 | 15:33 | 03:56 | 16:33 | 11:48 | - | 10:48 | 23:26 | 01:11 | 13:48 | 02:11 | 14:48 | 00:41 | 13:18 | 01:56 | 14:33 |
| 13. feb. | 02:11 | 14:35 | 01:11 | 13:35 | 01:26 | 13:50 | 04:11 | 16:35 | 05:11 | 17:35 | 00:26 | 12:50 | 11:50 | - | 02:26 | 14:50 | 03:26 | 15:50 | 01:56 | 14:20 | 03:11 | 15:35 |